## Grønland fyrimynd

Grønland skal hava ein lut í tí danska menningararbeiðinum í tí fátæka partinum av heiminum. Tað samdust danski menningarmálaráðharrin, Søren Pind, og Kuupik Kleist, landsstýrisformaður, um í síðstu viku. Kuupik Kleist sigur við KNR, at grønlendingar hava drúgvar royndir innan fiskivinnu og at umsita tilfeingið í náttúruni, og at fólk í menningarlondunum kunnu fáa gagn av teimum grønlendsku royndunum. Ein av fyritøkunum, sum menningarlondini kunnu læra av, er Royal Greenland, og fyritøkan hevur longu víst ætlanini stóran áhuga.



## EHB risastórt tap

Alt bendir á, at húsagangurin hjá danska EHB Bank og grunni bankans fer at kosta meiri enn seks milliardir krónur. Tað sigur Jørn Astrup Hansen, sum er settur til nevndarformann í tí, sum er eftir av bankanum, og sum tað almenna Finansiel Stabilitet hevur yvirtikið. Jørn Astrup Hansen sigur við Børsen, at húsagangurin hjá EHB Bank er av "olympiskari støðd", sum hann tekur til. Fíggjareftirlitið kunngjørdi í síðstu viku, at tað hevur meldað gomlu leiðsluna í EHB-bankanum til løgregluna fyri at hava svikað við kursvirðinum á partabrøvum bankans.

# Fundur í morgin um Búgvan

**Kommunan og havnamyndugleikarnir í Runavík fara í morgin at viðgera málið um trolbátin Búgvan, sum antin sakk ella varð søktur út fyri Skipanes í seinastu viku**

SKIPSVRAK

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*



*Búgvin hevur ligið í fleiri ár og hevði einki fiskiloyvi*
*Mynd: Skipalistin*

Trolbáturin Búgvin av Toftum liggur framvegis á havsins botni inni á Skálafjørðinum, men verður tað, sum Kongshavnar havnastýri vil, verður báturin tikin upp aftur.

Fundur um hetta verður í morgin, sigur Magnus Rasmussen, borgarstjóri í Runavík.

Fundurin verður millum havnamyndugleikarnar, kommununa, og møguliga verður politiið eisini við.

Politiið arbeiðir við málinum, tí illgruni er um, at báturin var søktur við vilja, og tað er starnfliga bannað.

Eigarin hevur sjálvur sagt, at báturin lak og tí sakk.

Súni í Hjøllum, formaður í Kongshavnar havnastýrið segði um vikuskiftið við Portalin, at uttan mun til um skipið sakk ella varð søkt, er hetta eitt álvarsmál fyri umhvørvið. Havnastýrið fer undir ongum umstøðum at góðtaka, at Skálafjørðurin verður brúktur sum kirkjugarður fyri gomul skip, og tí er tað ett áfrávíkiligt krav frá havnastýrinum, at Búgvin verður tikin upp aftur fyri eigarans rokning.

Eigarin Jákup Adreas Hentze segði við Rás2 fríggjadagin, at hann sleipaði sjálvur bátin og ætlaði at sleipa hann heilt inn á Skálafjørð, har hann skuldi høggast upp, men av tí at veðrið var so ruskut, legði hann at á Skipanesi. Men haðani rak virkandi havnameistari hann burtur. Tá ið hann so fór frá landi aftur, sakk Búgvin.

## Stolið mat í Miðvági

STULDUR

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seinastu vikurnar hava verið óvanliga nógv innbrot í Vágum, og hetta vikuskiftið hava aftur tvey verið.

Leygarmorgunin varnaðust grannar, at óbodnir gestir høvdu verið í einum húsum, sum stóðu tóm.

Rúturin í høvuðshurðini var brotin.

Politiið heldur ikki, at har er stolið nakað, men tann ella tey, sum hava verið inni og rótað í skápum og skuffum.

Í morgun kom ein nýggj fráboðan um innbrot í Miðvági.

Maðurin varnaðist innbrotið, tá ið hann kom heim úr útlondum.

Ein rútur í einum vindeyga varð tikin úr.

Í hesum førinum hava tjóvarnir verið í frystiboksini og tikið turt og ræst kjøt, og haraftrat hava teir tikið nakað av peningini.

Politiið veit ikki, um nakað samband er millum hesi bæði innbrotini og tey undanfarnu.

## Felagarnir sovnaðu

**Ein maður varð tikin koyrandi fullur leygarkvøldið í Havn. Hann hevði einki koyrikort, og felagar hansara í bilinum vóru eisini dýrandi fullir**

RÚSDREKKAKOYRING

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Seint leygarkvøldið fekk politiið í Havn fráboðan um ein bil, sum koyrdi Yviri við Strond, og einki fantilsi var á koyringini.

Politiið steðgaði bilinum í Haoyvík, og tað vísti seg, at bilførarin var fullur, og haraftrat hevði hann einki koyrikort.

Hann hevði verið ein biltúr í Havn saman við tveimum vinmonnum og var tá á veg heim aftur í Eysturoynna.

Politiið fór við bilføraranum at taka blóðroynd, og tá ið politistarnir komu aftur til bilin, lógu hinir báðir fullu menninir í bilinum og svóvu.

Boðini, sum teir fingu, vóru at finna sær onkran annan fart inn í Eysturoynna.

Allir tríggir menninir vóru tilkomnir.